## Indiskur MG Rover



Ein nýggjur MG Rover kemur á evropeiska marknaðin í ár. Talan er um ein bil, ið verður gjørdur á Tata verksmiðjuni í India. Tata er størsta ídnaðarkonsern í India við 225.000 starvsfólkum í 80 fyritøkum.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Ein fyri hvørjar tveir



Italski kanningarstovnurin, Osservatorio Autoprometec, hevur gjørt eina kanning av hvussu nógvir bilar eru fyri hvønn íbúgva í ES-londunum. Úrslitið varð at í meðal eru tveir bilar pr. íbúgva. Italia liggur á odda við 57 bilum fyri hvørjar 100 íbúgvar.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Góð ár hjá Audi



Sjeynda árið á rað slóð Audi bilverksmiðjan sítt egna sølumet í 2002. Sølan vaks við 2,1 prosentum til 741.700 seldar bilar um allan heimin. Útflutningurin var upp á 67 prosent.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Auto Trade – nýtt Lada umboð í Føroyum

**Russisku Lada bilarnir, ið hava verið gjørdir síðan 1970 og komu til Danmarkar í 1972, vóru nógv seldir í Føroyum í 70-unum. Nú er fyritøkan Auto Trade í Havn vorðin Lada umboð í Føroyum**

BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*

Teir fyrstu Lada bilarnir sum komu higar í 70-unum, vóru gjørdir uppá licens frá Fiat.

C.C. Johansen í Havn vóru teir fyrstu sum seldu Lada bilarnar í Føroyum. Seinnu árini hava vit lítið og onki sæð til hesar russisku bilarnar her hjá okkum. Nú er fyritøkan Auto Trade í Havn vorðin umboð fyri Lada bilarnar. Fyritøkan kemur at halda til á Bóndaheyggi 20, har hølir vera innrættaði til endamálið í løtuni.

Stjórin í Auto Trade, Jens Pauli Dahl, sigur at fyrstu bilarnir vera her í mars. Talan verður um Lada 110 (sedan), 111 (stationcar) og 112 (hatchback). Bilarnir hava 1,5 litur 16V motor við 91 hk. Teir koyra 13,7 km/l. Hesin motorurin er gjørdur í samstarvi við týsku Porsche bilverksmiðjuna. Prísurin á bilunum kemur at verða umleið 100.000 krónur her hjá okkum.

Seinni kemur ein nýggjur Lada Niva jeepur, ið verður gjørdur í samstarvi við General Motors, hetta verður ein bíligur jeepur við allar trygdarútgerð. Lada Niva, ið verður gjørdur í bæði bensin og diesel útgávum, kemur at kosta umleið 170.000 krónur. Annars eru fleiri nýggjheitir á veg frá Lada. Næsta ár kemur Lada Kalina, ið er ein bilur, sum verður gjørdur sum sedan, hatchback og MPV.



*Í mars mánaði koma Lada bilar aftur hendanvegin. Her er ein væl útgjørdur Lada 110 sedan.*



*Lada Niva jeepur við spoilarum og aðrari eykaútgerð. Um ikki so langa tíð kemur ein nýggjur Niva, sum verður gjørdur í samstarvi við General Motors*

# Ford Fusion – sum vørubilur og MPV

**Ford kemur nú á marknaðin við Fusion, ið er ein MPV útgáva av nýggja Fiesta. Bilurin er í stødd við Fiesta, men hann er 10 cm hægri og hevur harvið meira pláss. Fusion fæst bæði í diesel og bensin útgávum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Í staðin fyri at gera ein Fiesta stationcar, koma Ford nú á marknaðin við Ford Fusion, ið er ein MPV útgáva av Fiesta. Talan er um ein rúmligan og praktiskan bil, har tey ferðandi í bilinum sita høgt og hava gott útsýni. Bilurin hevur størri fríhædd og sær út sum ein "off-roadari". Fusion er væl egnaður til ungar barnafamiljur, sum hava brúk fyri einum rúmligum bili, uttan at hann harvið neyðturviliga má vera so stórur. Bilar í hesi støddini verða nógv brúktir sum vørubilar, tí verður tann fyrsti Fusion, ið kemur hendanvegin, ein vørubilur. Bilurin er serliga væl egnaður hjá t.d. handverkarum, ið ikki hava brúk fyri alt ov stórum lastarúmi. Fusion fæst við 1,4 og 1,6 litur bensinmotorum við ávikavist 80 og 100 hk og við einum 1,4 litur TDCi common-rail turbodiesel motori við 68 hk.




*Ford Fusion er væl egnaður til barnafamiljur, og um vørubilur hjá t.d. handverkarum. Bilurin fæst bæði í bensin og diesel útgávum.*



# Prix Føroyar beinleiðis í ÚF

PRIX FØROYAR
*Útvarpið*

Á fyrsta sinni fer útvarpið at senda beinleiðis frá øllum undanumførunum í Prix Føroyum.

Byrjað verður hvørja ferð klokkan 21.15, tá fyrsti bólkurin fer á pallin, og sent verður til umleið klokkan 1, tá vinnarin væntandi er funnin.

Millum framførslurnar verða SMS-kappingar, Prix-prát, prát við bólkarnar og ymiskt annað á skránni.

Í samband við Prix Føroyar 2003 hevur útvarpið gjørt eitt nýtt kjakforum, har ætlanin er at áhugað kunnu kjakast um stórsta tónleikaliga tiltakið í landinum. Sí www.uf.fo/prix

Útvarpið sendir beinleiðis frá øllum undanumførunum, sum verða: 25. januar, 1. februar, 15. februar, 22. februar, 8. mars, og 15. mars. Sent verður sjálvandi eisini frá finaluni í Norðurlandahúsinum, 26. apríl.

# Tíðindaskriv til fjølmiðlar

**Fiskivinnusamráðingar vóru millum Føroyar og Noreg í Tórshavn í døgnunum 15.-16. Januar 2003 um sínámillum fiskiveiðuavtalu í 2003**

FISKIVINNU-SAMRÁÐINGAR
*Fiskimálaráðið*

Hóast norðmenn høvdu lagt upp til, at samráðingarnar um norðhavssild skuldu tengjast at sínámillum avtaluni við atliti at spurninginum um atgongd at veiða føroyskan makrel í norskum sjógvi, so gjørdist úrslitið, at norðmenn sleptu hesum kravi og ein avtala var gjørd fyri 2003.

Sínámillum fiskiveiðiavtalan fyri 2003 verður soleiðis:

**Toskur, hýsa, upsi og lodna í Barentshavinum**
Toskakvotan verður óbroytt 1700 tons, hýsukvotan fer úr 350 tonsum uppí 400 tons, upsakvotan fer úr 350 uppí 450 tons og av øðrum fiskaslogum verða 50 tonsa. Russland og Noreg samdust um, at heildarveiðan av vetrarlodnu fer úr 630.000 tonsum í 2003 niður í 310.000 tons í 2003. Hetta viðførir, at føroyska lodnukvotan í norska partinum av Barentshavinum verða yvirførd til norskan sjógv 2.600 tons av toski, 200 tons av hýsu, 280 tons av øðrum og 5000 tons av lodnu.

**Svalbard og Jan Mayen**
Grundarlagið fyri føroysku veiðuni eftir toski og øðrum við Svalbard varð í 12996 sett til 0.207& av heildarkvotuni. Fyri tosk verður føroyska kvotan sostatt óbroytt 818 tons fyri 2003. Fyri onnur riskasløg verður kvotan 197 tons.

Rækjuveiðan við Svalbard fyri føroysk skip er óbroytt 1317 fiskidagar.

Við Jan Mayen kunnu veiðast 100 tons av svartkjafti og 50 tons av rækjum.

**Veiðan í Norðsjónum sunnanfyri 62° N**
Makrelkvoturnar lækka í mun til niðurskurðin í heildarveiðuni. Føroyska makrelkvotan í norskum sjógvi verður 1.475 tons í 2003. Harafturat verður yvirført av førosykum makrelkvotuni í norskan sjógv 9.700 tons. Rossamakrelkvotan verður 1000 tons. Upsakvotan verður óbreytt 1400 tons. Sildakvotan verður 700 tons. Av svartkjafti kunnu eisini veiðast 500 tons í ávísum øki.

Ídnaðarkvitan verður 8000 tons av hvítingsbróður, 3000 tons nebbasild og 8000 tons svartkjafti.

Um veiðan eftir svartkjafti fer útum tey 8000 tonsini, so ber til at útjavna við hvítingsbróður. Tað sama er galdandi fyri nebbasild.

**Veiðirættindi hjá Noreg á føroyskum øki**
Botnfiskakvotan hjá norskum skipum í føroysum sjógvi er óbroytt 5.222 tons tilsamans. Haraftur koma 75 tons av svartkalva og 25 tons av havtasku. Botnfiskakvotan er nú býtt upp í 2.200 tons av longu/blálongu, 1.800 tons av brosmu, 400 tons av upsa og 822 tons av øðrum fiskasløgum. Hetta hevur við sær, at hjáveiðan av øðrum fiskasløgum minkar og harvið veiðan eftir toski og hýsu.

Skipanin á Førya Banka við avmarkaðum fiskidagatali stendur við.

**Veiðurættindi hjá Noreg á føroyskum øki**
Botnfiskakvotan hjá norskum skipum í føroyskum sjógvi er óbroytt 5.222 tons tilsamans. Harafturat koma 75 tons av svartkalva og 25 tons av havtasku. Botnfiskakvotan er nú býtt í 2.300 tons av longu/blálongu, 1.800 tons av brosmu, 400 tons av upsa og 822 tons av øðrum fiskasløgum. Hetta hevur við sær, at hjáveiðan av øðrum fiskasløgum minkar og harvið veiðan eftir toski og hýsu.

Skipanin á Føroya Banka við avmarkaðum fiskidagatali stendur við.

Norska svartkjaftakvotan verður 36.200 tons og makrelkvotan 6.100 tons í 2003. Rossamakrelkvotan verður 230 tons.

Nakrir tekniskir eftirlitsspurningar vóru esini viðgjørdir fyri at betra um fiskiveiðieftirlitið. Tað eru reglur um umrokningsfaktorar, krav um lastaplan, ungfiskareglur galda nú eisini fyri norsk skip, reglur um minsta íblanding av undirmátsfiski, tal á skipum og fráboðanskipanin herundir fylgisveinaeftirlit. Hjáveiðireglurnar verða eisini greiðari.



## Minningarorð um mín kæra mammubeiggja



# Willy Hansen

## Sørvágur

**Føddur 9. februar 1948**
**Deyður 9. november 2002**

Góði Willy!

Ikki var tað í mínum huga, at fríggjakvøldið skuldi verða títt allarsíðsta kvøld her hjá okkum. Sum altíð var tað hugnaligt at fáa teg inn á gólvið. Onkuntíð bleiv tað bara til eitt stutt prát í hurðini, og so var tú úti aftur. Men eisini, so sat tú eina góða løtu.

Vit her í húsinum hava kent teg alt vit kunnu minnast, og nógvar góðar løtur hava vit at minnast aftur á. Tómrúmið og saknurin er ótrúliga stórur.

Men minnini eru her.

Allir teir góðu túrarnir, vit høvdu upp á Egg. Tú, eg og Lisa. Tú visti so nógv at siga frá.

Sum barn var eg von at standa niðri í bygdini, og tað var so mangan, tú kom gandandi út eftir ella heimeftir, so fekk eg eina krónu í hondina.

Nógv rennur fram fyri meg, tá eg soleiðis siti og hugsi.

Tað var so hugnaligt at hoyra teg og mammu tosa. Altíð so vinarliga. Tit stóðu hvørjum øðrum sera nær.

Men lítillátin sum tú var, so gjørdi tú ongantíð nógv burtur úr tær sjálvum.

Tú vart bara her hvønn dag, eisini hetta síðsta fríggjakvøldið á foldum, og vit fingu okkum eitt gott prát.

Vit sakna teg nógv.

Nú ert tú farin, men minnini, tey kann ongin taka frá okkum, og tey vilja vit goyma í hjørtum okkara, til vit øll síggjast aftur ein dag.

Við hesum orðum vil eg lýsa frið yvir minnið um teg, mín góði mammubeiggja – Willy Hansen.

**Eiley**